## DAGSINS MEINING

# Føroysk ella donsk hjálp?

Allur bati bøtir, sigur eitt gamalt orð. Við hesum fyrndarorði í huga kundi tað fyri alt tað verið líkamikið, um peningurin, sum er savnaður í Føroyum, fer til tey neyðstøddu við einum donskum ella føroyskum spjaldri. Vit geva ikki fyri at kunnu rósa okkum av, hvussu nógv vit hava givið í mun til eitt nú grannar okkara. Hugsa vit soleiðis, so eru vit eins og fariserarin á sinni. Vit geva fyri at veita teimum neyðstøddu eina hjálpandi hond. Tá ið tey gomlu góvu og hjálptu, so hendi hetta oftast í loyndum. Hetta var fyri ikki at eyðmýkja móttakaran og fyri ikki at gerast sum farisearin.

Men vit liva í eini aðrari tíð, har alt er meira ella minni alment, eisini vælgerðin. Vit geva í fullum almenni. Øll skulu vita, hvussu gávumild og hjálpsom, vit eru. Soleiðis er mentanin vorðin. Hetta er ikki bert okkara fáfongd. Hetta er eisini fyri at eggja øðrum til at gera sum vit. Hetta er sostatt í grundini bara gott. Vit staðfesta enntá, at vit eru gávumildari enn eitt nú danir. Onkur fýlist so á, at okkara peningahjálp fer beinleiðis inn í samlaðu hjálpina hjá Danska Reyðakrossi. Føroysk ella donsk hjálp - er tað ikki eitt feitt, bara hjálpin kemur teimum, ið mest treingja til góðar? Svarið er ikki heilt einfalt. Vit halda, at henda atfinning ikki uttan víðari kann verða skúgvað til viks. Tað kann bara vera gott og gagnligt, ja, enntá upplívgandi hjá teimum neyðstøddu at frætta, at ein munagóður partur av peningahjálpini, sum er nýttur til tjøld, mat og heilivág, kemur úr einum so fjarskotnum og so lítlum landi, sum tey valla hava hoyrt um.

Tað kemst heldur ikki uttanum, at neyðhjálp eisini er politikkur. Vit eru júst í ferð við at taka eitt nýtt og avgerandi stig móti størri uttanríkispolitiskum heimildum. Við hesum í huga, átti føroyska hjálpin hjá Reyðakrossi at verðið eyðmerkt sum tað, ið hon er: nevniliga føroysk hjálp. Vit taka í hesum høpi als ikki undir við tí farra av chauvinistisku undirtónum, sum hava eyðkent okkurt av tí, sum er borið fram um hendan spurning. Men vit vilja halda fast við ta principiellu støðu, at føroysk hjálp skal veitast, sum tað hon er, nevniliga hjálp úr einum sjálvstýrandi landi í danska ríkinum. Hetta landið eitur sum kunnugt Føroyar og felagið eitur tí Reyðikrossur Føroya. Reyðikrossur Føroya eigur at fáa hetta í rættlag. Tað má kunna gerast, uttan at felagsskapurin skal seta á stovn eina dýra umsiting. Tað má kunna gerast eitt nú við, at danska meginfelagnum verður álagt at kunna móttakararnar um, at hesir og hasir partarnir av neyðhjálpini koma úr Føroyum, sum er sjálvstøðugt land í danska kongsríkinum. Reyðkrossur Føroya eigur í álvara at umhugsa hendan spurning.

At enda skulu vit loyva okkum at ynskja Reyðakrossi Føroya tillukku við skjótari og góðari hjálp og við einum stak vælfyriskipaðum og væleydnaðum innsavningartiltaki. Reyðikrossur Føroya eigur mikið rós uppiborið fyri vælútinnt verk í sambandi við sorgarleikin í Asia. Felagið hevur prógvað, tað er tann føroyski stovnur, sum tað almenna og tann einstaki føroyingur skulu seta sítt álit á, tá neyðugt er við katastrofuhjálp úr Føroyum. Lat ongan iva vera um tað.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Áheitan á Jógvan á Lakjuni og bý- og bygdaráð í Suðuroy: Lati vit og skil ráða

**Nita Næs**
*í Nesi*
*í Hvalba*



Nógv er sagt og skrivað um miðnámsskúla okkara her suðuri, og eru flest fólk við tíðini vorðin ósamd, rúkandi ill, ella líkasæl, hvar hesin skúli í framtíðini skal liggja.

Skúlaárið 1987-88 gekk eg á HF her suðuri. Tá ið fólk spurdu, hvar eg gekk í HF, svaraði eg: Eg gangi á Tvøroyri og í Vági. Tað var veruliga so, at ávísar dagar varð byrjað á Tvøroyri, har vit fingu undirvísing t.d. í fýra tímar, síðan koyrdu vit til Vágs við bygdaleiðum ella við onkrum lærara, har vit vórðu undirvíst víðari. Um einki samband var við Bygdaleiðum, tá ið skúladagurin var á enda komin, umleið kl. 17, ja, so koyrdi ein taxabilur meg aftur til Hvalbiar.

Soleiðis gingu tvey ár, og áðrenn mína tíð, høvdu tríggjar av mínum systrum havt somu skúlagongd, tí soleiðis var gongdin nógv tey fyrstu árini av HF-útbúgvingini.

Øll hesu ár, frá 1974 til fyrst í nítiárinum, var hetta veruleiki. Hetta góðtóku vit øll, tí vit høvdu øll fingið at vita frá fólkavaldu landspolitikarunum, ið vit høvdu álit á og virðing fyri, at vit skuldu hava tol, tí um ikki so langa tíð var farið undir at byggja miðnámsskúla í Hovi.

Vit ungu sóu fyri okkum henda framtíðar skúla og gleddist um hann.

Eg havi mangan spurt mínir politisku partamenn, hví henda ætlan fall fyri bakka. Hon fall nevniliga ikki í føðingini, hon var búgvin og hon var okkara. MEN tíanverri, soleiðis er politikkur vorðin, fólkavaldir menn og kvinnur gera rossahandlar, ið eru løtuvinningar, og neyvan hugsa teir um avleiðingarnar. Neiligar avleiðingar, sum liva víðari frá einum ættarliði til annað, og sum beinleiðis hava niðurbrótandi slóðir eftir sær. Hetta sæst einamest í hugburðinum millum nógvur suðuroyingar nú prátið um miðnámsskúlin aftur er á skránni.

Tað er at undrast á, at menn, ið verða valdir at taka politiskar avgerðir, ikki tora at taka tær. Somuleiðis, er tað at undrast á, at eitt arkitektavirkið, ið vinnur eina teknikapping, skal hava so nógv at siga í einum slíkum máli. Somuleiðis skilji eg als ikki, at vágbingar skulu hava so nógv at siga í einum slíkum máli, og at fólkavaldur vágbingur, tulkar tað sum forfylging, at skúlin á Eiðinum ikki verður veruleiki, men møguliga fluttur til eitt betri stað, allari oynni at gagni.

Ein miðnámsskúli er eitt landsmál. Landsstýrismaðurin sær sjálvsagt, at aftaná at Hovstunnilin er komin, hevur ein nýggjur miðnámsskúli eitt natúrligt betri pláss í Hovi enn vesturi á Eiðinum í Vági. Eg hevði skilt tað betri, um Vágs kommuna hevði latið eitt grundstykki til nýggja skúlan á Nesi, í Vági, har ein beinavegin hevði verið við skúlan, uttan at koyrt gjøgnum tronga bygdarvegin í Vági.

Ein Landstýrismaður eigur at hugsa stórt og fram eftir. Jógvan á Lakjuni torir kanska tað. Javnaðarmenninir tordu tað ikki, ei heldur tjóðveldismenninir, ið hugsaðu mest um sín egna eingjargarð. Suðuroyggin hevur brúk fyri einum landstýrismanni úr norði, sum sær alt við øðrum eygum enn teimum smáu lokalu.

So Jógvan á Lakjuni: Vónandi gert tú tað!

Í hesum tíðum, verður so nógv tosað um at leggja saman í størri eindir. Men hvat meina vit í veruleikanum við tað, tá ið vit samstundis hava tann hugburð, at nakað verður tikið frá Vágs kommunu, um nakað verður bygt upp í Hovs kommunu.

Tað hevur tí sera stóran týdning, ja, er alneyðugt, at fólkavaldu landspolitikarar okkara úr Suðuroy vísa seg sum hugsjónarligar fyrimyndir, har teir hugsa um Suðuroynna sum eina heild og byggja varðar hareftir. Tað gera teir ikki í løtuni, har teir fara í bløðini at togtogast um, hvør vil byggja nakað gott upp her suðuri, og hvør vil bróta niður. Tað, at teir alment siga og meina, at nakað verður tikið frá Vágs kommunu, um tað verður flutt til Hovs, til dømis, er eit vónbrot at hoyra og tað er ófatiligt at hugsa sær, at royndir politikkarir halda fram at hugsa so stutt!

So góðu tit allir: Hergeir, Hendrik, Johan, Sverri og Jóannes: Hugsi frameftir, tí tað er bert saman, at vit og tit eiga eina framtíðar oyggj, har vit øll trívast og hava tað gott.

Nú bý- og bygdaráðini eru mannað av nýggjum, er mín áheitan á tey, at tey lata vit og skil ráða, nú tey hava fingið nýggja umhugsingarfreist frá Landstýrismanninum.

Eg vil enda við at siga, at sjálvsagt er tað ikki Vágs kommuna, ið hevur ábyrgdina av, hvar nýggi miðnámsskúlin skal liggja. Tað er Landstýrismaðurin Jógvan á Lakjuni, sum hevur ábyrgdina fyri at skúlin verður bygdur á røttum staði.

E.S.: Hugsi tykkum eina framtíð, har 90% av studentunum fer súkklandi í skúla.Okkara nýggi Hovstunnil hevur sjálvsagt góða, ljósa súkklubreyt, har næmingar bæði úr Froðba, Lopra, Vági og Tvøroyri, kunnu fara súkkandi til nýggja miðnámsskúlan í Hovsdali.

## Svar til Føroya Blaðmannafelag

Fólkavaldir persónar í arbeiðsørindum eru ikki í mínari bók privatpersónar.

Men takk fyri upplýsinginum um, at Føroya Blaðmannafelag hevur ikki somu áskoðan. Tað kunnu fólk so hvør í sínum lagi taka støðu til.

Vinarliga

**Dan Klein,**
**blaðstjóri á**
**Oyggjatíðindum**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.